

**Innbjóðing til jólasølukafé**
**fríggjadagin 2. desember 2016 kl. 15 – 17**

Góðu foreldur, systkin, ommur, abbar og øll onnur ☺

Aftur í ár skipa vit í Skúlin við Løgmannabreyt fyri einari jólasølukafé, har ágóðin fer óskerdur til átakið "Í menniskjum góður tokki".

Hetta átak snýr seg um barnahendur, sum baka, skapa og geva. Tað snýr seg um at gleða onnur børn í Føroyum, sum hava tað ómetaliga trupult, og tað snýr seg um at rætta eina hjálpandi hond til tey, sum tørva.

Møguleiki verður at keypa sær kaffi, the, leskidrykk og vaflur. Somuleiðis verður tað møguligt at ogna sær ymiskar lutir, sum børn tykkara hava tilevnað.

Lutaseðlasøla verður eisini, har fleiri góðir vinningar eru at vinna.

Øll eru hjartaliga vælkomin at vitja okkara jólasølukafé ☺